## Men tað skal eisini ruddast aftur

Øll, sum á ein ella anan hátt fáast við fyriskiping av tiltøkum, vita, at meðan tað kann vera nokk so hugaligt at rigga til, so er tað straks verri, tá upptøkurnar eftir tiltakið skulu takast. Tí kann tað at síggja til virka rættiliga paradoksalt, at fólk stríðast og strevast undan einari stevnu fyri at fríðka um og prýða, tá alt eftir fáum tímum sær út sum ein bumbaður horikassi. Tíbetur skal ikki alt takast upp við hond, tí maskinur av ymsum slagi hjálpa til við ruddingini. Eins hjálpsom Tórshavnar kommuna er mótvegis fyriskiparunum tá riggast skal til, eins hjálpsom er hon, tá ruddast skal upp. Hesin sópibilurin var millum góðsið, sum kom til Nólsoyingar mikukvøldið, og skal spara kommunuarbeiðarunum fyri almikið stríð.



# Tá Ove lovaði burtur olmussu

**Ovastevnan er komin fyri at vera, verður ofta tikið til, men tað eru ikki mong ung ið vita, hvør Ove Joensen var. Spurnarkappingin á Rás2 í gjár avdúkaði, at fólk ikki vita so frægt um hesa okkara nútíðar hetju, sum eftirnavnið. Vit greiða her frá søguni um Ovastevnuna**

OVASTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Skal ein trúgva lurtarunum hjá Rás2, so er Ovastevnan ógvuliga væl umtókt. Men sambært somu lurtarum, so eru tað ikki so mong – av teimum ungu í hvussu er – sum vita hvør Ove Joensen er, og hví vit halda Ovastevnu.

Ove Joensen setti sær fyrst í 80-unum fyri at rógva í 6-mannafari einsamallur úr Føroyum niður til Danmarkar. Hann royndi fyrstu ferð í 1984, men mátti seta upp í Hetlandi. Aftur í 1985 endaði royndin í Hetlandi, og føroyingar høvdu mestsum mist vónina um, at tað fór at eydnast Ova Joensen at útinna hetta bragdið.



*Tað var Bjørg Poulsen, sum kom við hugskotinum at skipa fyri einari bygdastevnu í Nólsoy, teirri nú so kendu Ovastevnuni. Her setur Randi Frederiksberg Ovastevnuna í fjør*

*Mynd: Leo Poulsen*

Tí var áhugin fyri triðju royndini í 1986 ikki serliga stórur. Men tá tað umsíður eydnaðist Ova Joensen at vinna framvið Hetlandi, vaks áhugin almikið, og tá hann so nærkaðst Limfjørðinum, var landið á gosi.

Rómurin vildi ongan enda taka, tá Ove Joensen 11. august 1986 eftir trý ára royndir lagt um leingi kundi stíga á land á Langelinje og har kyssa Den lille Havfrue.

Móttøkan, tá »Den gale færing« kom aftur til Føroya er ikki sæð á hesum breiddarstigum. Hon var størri, enn tá landsliðið vann í Landskrona. Hon var størri, enn tá Pál Joensen gjørdist trífaldur europameistari.

Og har vórðu móttøkur hildnar um alt landið. Allar størri bygdir og býir við virðing fyri sær sjálvum, bjóðaðu Ova Jeonsen til móttøku.

Eisini yvirborgarstjórin í Keypmannahavn sá seg ikki ov stóran til at bjóða Ova Joensen í audiens.

### Stovna Ovanevnd

Tá rómurin var størst, nevniliga tá Ove Joensen kom aftur til Nólsoyar, greiddi Ove frá, at hann á einari av sínum royndum at rógva til Danmarkar, var komin so illa fyri, at hann lovaði burtur olmussu. Hann lovaði, at kom hann livandi frá veðrinum, skuldi hann útvega nólsoyarbørnum ein svimjihyl.

Tíverri untist ikki Ova Joensen at uppfylla hetta lyfti, tí ein vakran novemberdag í 1987 druknaði hann í durdarveðri á Skálafjørðinum.

Birgir Andeasen, sum alla tíðina hevði trú upp á Ova, og sum øll trý árini hevði verið sponson hjá honum, tók, saman við nólsoyingunum Hilmar Joensen og Egon Hansen, stig til eina Ovanevnd við hevndu limum. Endamálið var at savna inn eina millión krónur, sum skuldu nýtast til eina verkætlan at byggja ein svimjihyl í Nólsoy.

Hetta endamál var nátt innan langa tíð, men so komu ringu fíggjarligu tíðirnar, og at Fossbankin fór av knóranum merkti í fyrsta lagi, at Ovanevndin misti um helmingin av savnaða peninginum.

Í trongu tíðunum kendi verandi nevndin seg útbrenda, og stig vóru tikin til, at fáa nýtt blóð í nevndina. Hetta hendi í heysti í 1992, tá Bjørg Poulsen, Oda Jacobsen og Leo Poulsen vórðu vald.

Skipað var fyri ymsum tiltøkum næsta árið, og á sumri 1993 bar Bjørg Poulsen á einum nevndarfundi upp á mál at gera eina roynd at skipa fyri einari bygdastevnu til tess at savna pening til svimjihylin. Hesum tóku hini í nevndini undir við, og fyrsta trilvandi royndin varð gjørd vikuskiftið 13., 14. og 15 august.

Heta vikuskiftið varð vald, tí hetta lá næst tí dato – 11. august – tá Ove Joensen kom niður til Langelinje.

Tá nýggj nevnd varð stovnað fekk hon navnið Stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy, og hendan nevndin skipaði heilt fram til fyri fáum árum síðani einsamøll fyri Ovastevnuni. Í dag eru hini feløgini í bygdini við at skipa fyri og at fáa ágóðan av stevnuni. Men heitið er framvegis Ovastevna.

# Ganga høgt upp í fótbóltin

**Í fjør kom eitt nýtt tiltak á Ovastevnu á banan – bókstaviliga. Terji Rasmussen tók stig til at skipa fyri fótbóltsdyst millum yngri og eldri tónleikarar**

OVASTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var gamalt, at til eina rættiliga stevnu hoyrir eisini ein rættiligur fótbóltsdystur. Og sum rættur B36 fótbóltsfjeppari, og sum rættur nólsoyingur, so tók Terji Rasmussen tað á sítt bak, at skipa fyri slíkari kapping. Og sum tónleikari var tað nærliggjandi, at skipa fyri einum fótbóltsdysti millum – tónleikarar.

Hvussu liðini skuldu mannast var avgjørt á Solemonskan hátt. Teir eldru móti teimum yngru. Og skeringsárið er 30.

Vit skipaðu fyri einum dysti fyrraárið, men tað var meira til stuttleika. Í fjør skipaðu vit so fyri einum seriøsum dysti, við steypi, veruligum búnum og dómara, sigur Terji Rasmussen.

Og í ár eru teir farnir enn eitt stig víðari. Nú er tað ikki hvør sum helst dómari, men sjálvur FIFA dómari okkara, Petur Reinert, sum skal halda skil á.

Í fjør gjørdist talan um ein sera spennandi og málríkan dyst, har teir eldru vunnu 11-8 – ella har á leið.

Teir fingu so steypið, sum Ljóð-Tøkni hevur latið, til varðveitslu.

Í ár verða steyp eisini latin til dagsins mann á hvørjum liði, annað latið av Sp/F Rulio, og hitt av Simma Musikhús.

Til dystin í morgin hevur eldra liðið, sum hevur Terja Rasmussen til managara, menn sum fyrrverandi landsliðsleikararnar Una Arge og Jóannes Jakobsen, Árna Andreasen, Oskar Eiriksson og Poul Müller.

Yngra liðið, har Uni Debess er managari hevur, umframt managaran sjálvan, Bárður á Lakjuni og Petur Háberg, ið er góður styrkur, men samstundis verða Michael Blak of Búi Dam ikki við.

Dystrin verður leygardagin klokkan 15, og aftur í ár verður sjúrður Skaale frásøgumaður.



*Ein stoltur managari við ferðasteypinum*

*Mynd: Leo Poulsen*